**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Radiografur/ røntgensjúkra-røktarfrøðingur

Á Røntgendeildini er eitt fulltíðarstarv sum radiografur ella røntgensjúkrarøktarfrøðingur leyst at søkja til setan 1. januar 2007 ella eftir avtalu. Starvið er við tilkallivakt frá heimi, kvøld/nátt og vikuskifti.

Á Røntgendeildini verða umframt vanligar konventionellar kanningar gjørdar
- mammografi
- ct-skanningar
- ultraljóðkanningar
- mr-skanningar

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum radiografur/røntgensjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- kunnleiki til mr-skanningar er ein fyrimunur

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Lønar- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Radiografar í Føroyum/Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ragnu Reinert, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 5507 ella t-post rtragna@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 4. desember 2006 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrd, at umsóknin er okkum í hendi áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn** við avriti av prógvum, CV og viðmælum skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
100 Tórshavn




## Søkt verður eftir aðalskrivara til Bláa Kross Føroya



**Aðalskrivari okkara hevur valt at royna nýggjar leiðir. Tí søkja vit eftir nýggjum aðalskrivara til eitt spennandi og avbjóðandi starv til ein felagsskap í støðugari menning, har tú sjálvur myndar tín arbeiðsdag.**

**Sum aðalskrivari hevur tú m.a. ábyrgd av**
- at fremja avgerðir hjá landsnevndini
- dagligu leiðsluni av felagsskapinum og at arbeitt verður innan fíggjarligu karmarnar
- starvsfólkunum
- samskiftinum við staðbundnu blákrossfeløgini
- norðurlendska og altjóða samstarvinum.

**Vit rokna við, at tú**
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- hevur gott yvirlit og evni at raðfesta ymiskar uppgávur
- hevur góð leiðara- og samstarvsevnir
- hevur hegni at samskifta við áhugabólkar felagsins
- kanst samskifta á enskum máli
- ert limur í fólkakirkjuni og persónliga trúgvandi
- tekur undir við blákrosshugsjónini.

**Løn og setanartreytir**
Starvið er eitt fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Løn sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Jaspur Langgaard, tlf. 470 700 ella jl@blakross.fo

Umsókn, saman við prógvum, viðmælum v.m., skal sendast til

Blái Krossur Føroya

Blái Krossur Føroya, Heiðavegur 6, 620 Runavík, Føroyar

Umsóknarfreistin er 5. desember 2006 kl. 12.00.
Viðmerk á brævbjálvan "Umsókn". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

KREA.FO 478080

Blái Krossur Føroya, ið telur umleið 1500 limir og 8 staðbundin feløg, er ein kristiligur fráhalds- og hjálparfelagsskapur, ið arbeiðir við fyribyrging, umsorgan og hjálp til misnýtarar av rúsdrekka og rúsandi evnum. Umframt tað fyribyrgjandi arbeiðið, við m.a. verkætlanini Børn í vanda, eigur og rekur Blái Krossur Føroya viðgerðarstovnin Blákrossheimið, Kafé Blákrossstovuna, 3 Búfelagsskapir og Blákrossbúðina. Tað eru umleið 20 lønt og 70 ólønt starvsfólk í felagsskapinum. Les meira á www.blakross.fo

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO | Sosialurin